# GÍ kiksaði enn eina ferð í Runavík



Óli Hansen skoraði móti fyrrverandi liðfeløgum, tá hann skoraði til 2-1 móti GÍ. Her er hann leysur við málverjanum

Mynd: Finnur Justinussen

**Brotssparksmál eitt korter undan leikloki avgjørdi tætta uppgerð heimaliðnum til fyrimunar**

NSÍ–GÍ

*Jóannes Hansen*

Tað var tætt, ferðin var á góðari leið, og málini vóru fimm í tali. Tí var talan sjálvandi um undirhaldandi uppgerð í góðveðrinum við Løkin. NSÍ sat eftir við øllum stigunum. Teir vóru sjálvandi fegnir um fyrsta sigurin í hesum árinum.

GÍ fór fyri aðru ferð í fimm dagar inn um Gøtueið uttan sigur. Teir fingu eitt stig á Toftum, og teir fingu einki í Runavík. Teir skoraðu tvey mál. Tað fyrra skoraði miðvallarin Sámal Joensen, og tað seinna varð miðverjin Bartal Eliassen skrásettur fyri. At tað ikki vóru teir fremstu hjá GÍ, sum skoraðu, boðar frá veruleikanum, at GÍ hevur ikki nakra serliga tyngd í fremstu røð. Súni Fríði Johannesen og Krzystof Popczynski vóru báðir á vøllinum. Hvørgin teirra tóktist vera eitt hundrað prosent klárur, og tað var sjáldan ella ongantíð, at teir vóru í støðum, sum mál kundi komið burturúr.

Tá NSÍ í fyrsta umfarinum var í Gundadali og tapti 4–0 ímóti HB, var tað týðuligt, at verjan var ikki nóg tøtt. Tað hevði Jógvan Martin Olsen tikið avleiðingarnar av. Pól Thorsteinsson var hesa ferð í miðverjuni saman við Arnfinni Langgaard, og avrikið var væl betri, enn tað var hjá NSÍ miðverjuni sunnudagin ímóti HB. Jens Martin Knudsen, sum ímóti HB var mest eyðsýndi NSÍ maðurin, hevði hesa ferð lítið annað at gera enn at stýra sínum liði (tann uppgávan skal avgjørt ikki undirmetast).

## Bara eitt mál

Í fyrra umfarinum vóru møguleikar báðar vegir, men tað kom bara eitt mál. Sámal Joensen var meistari fyri tí, tá hann úr stuttari fjarstøðu setti framvið fyrrverandi liðfelaganum í GÍ og íslendska Leiftri málinum.

Sámal Joensen var aftur hesa ferð eyðsýndur. Saman við Magna Jarnskor og Jóan Peturi Olsen fylti hann væl á miðvøllinum. Tá Jóan Petur fekk bóltin var skil í spælinum – hvørja ferð. Gøtumenn vita at siga, at hann hevur vant millum lítið og einki. Avrikið í tveimum teimum fyrstu umførunum vísir, at ein, sum næstan ikki venur, megnar at standa seg í kapping við teir, sum síðsta stóra fjórðingsárið hava vant fýra og fimm ferðir um vikuna.

Hjá NSÍ stóð Helgi L. Petersen sera sterkur ímóti gomlu liðfeløgunum í Gøtu. Hann arbeiddi sum ein hestur, vann nógvar nærdystir og megnaði ikki so sjáldan at sneiða fleiri av mótstøðumonnunum av sær, og harvið gjørdust støðurnar vandamiklar.

Í miðverjuni hjá GÍ hevði Bartal Elissen, sum tykist eitt sindur plágaður av fótskaða, fyri tað mesta gott tak á Óla Hansen. Men Óli vann eina duell, og tað var við til at avgera, at stigini vóru í Runavík.



Sonni L. Petersen fekk avgerandi brotssparkið, tá hann varð feldur í brotsteiginum móti endanum av dystinum. Her er hann í nærdysti við Leiv Hansen hjá GÍ

## Málríkt seinna umfar

NSÍ hevði í 1. hálvleiki eins nógv spæl og møguleikar sum gestirnir, og í 2. hálvleiki vóru teir oftast leikliga omaná. Upprunin til útjavnandi málið var diagonalsending úr vinstru. Ian Højgaard, sum alla tíðina var uttasti miðvallarin í høgru, sneiddi ein av sær, áðrenn hann sendi innfyri málið. Helgi L. Petersen tamdi, men fekk ikki sent móti málinum. Bólturin fór til innskifta Gert Langgaard, og hann sendi flatt inn um Hallur Hansen, sum alla tíðina var stórt álit í GÍ málinum.

NSÍ kom á odda, tá seinna umfarið var næstan hálvrunnið. Áslakur R. Petersen var um at beina innleggi úr høgru í egið mál, men bólturin fór út til horna. Tað sendi Sjúrður Jacobsen innfyri, og Óli Hansen var hægstur og stútaði dygst inn undir samankomingina. Eitt fínt mál.

GÍ svaraði aftur, og útjavnandi málið var heppið. Sámal Joensen sendi fríspark uttanvert brotsteigin í manngarðin, bólturin stakk út aftur til GÍ liðformannin, sum ro振di ímóti málinum. Bólturin tók høvdið á Bartali Eliassen og fór í málið.

So sá tað út sum um, at tað skuldi ganga NSÍ, sum tað so mangan hevur gjørt á heimavølli. Men teir fingu sigursmálið eitt korter undan leikloki. GÍ verjan gav í høgra borði púra óneyðugt fríspark. Jónstein Petersen sendi innfyri, og dómarin brīkslaði fyri brotssparki, tí GÍ verjan skuldi hava hildið. Tað vóru gøtumenn á og kring vøllin ikki nøgdir við. Sjúrður Jacobsen var tryggur úr ellivu metrum.

GÍ rosyndi at trýsta, men tað var ov lítil tyngd og broddur í. Við væl arbeiðandi og skilagóða Helga L. Petersen sum krumptappi á miðvøllinum og við Pól Thorsteinsson og Jens Martini Knudsen sum køldum stýrimonnum í verjuni eydnaðist tað at halda tætt. Og so var tað týðuligt, at stóra byrðan, sum tað var hjá NSÍ at tapa 4–0 í fyrsta umfarinum, ikki tyngdi so nógv longur.

NSÍ: Jens Martin Knudsen – Brynjolvur Nielsen, Arnfinn Langgaard, Pól Thorsteinsson, Jónstein Petersen – Ian Højgaard, Helgi L. Petersen, Sjúrður Jacobsen, Eddie Mikkelsen – Óli Hansen, Sonni L. Petersen

GÍ: Hallur Hansen – Áslakur R. Petersen, Bartal Eliassen, Leivur Hansen, Magnus Skoralíð – Hans Pauli Petersen, Magni Jarnskor, Jóan Petur Olsen, Sámal Joensen – Súni Fríði Johannesen, Krzystof Popczynski



# Skála bjargaði eina stiginum í síðstu løtu

**Skálamenn mugu verða mest fegnir um úrslitið í einum linligum dysti, sum skjótt fer í gloymibókina. B36 kendi ikki sína vitjunartíð, og tí fingu teir bert tað eina stigið**

LÍTIL FERÐ Á

Lítil ferð var á spælinum í fyrra hálvleiki á Skála hósdagin. Fáir málmøguleikar vóru, og tað sum var, átti B36. Skála hevði púrt onki at bjóða uppá henda fyrra hálvleikin, burtursæð frá einari roynd sum Jónhard Frederiksberg hevði, tá hann skeyt bóltin ov langt frá sær.

Ein hevði væntað, at meistararnar frá í fjør fóru at leggja eitt stórt trýst á skálamenn frá byrjan, men tað hendi ikki. Til tess gekk tað alt ov seint fyri seg.

Sjálvt um B36 hevði bóltin nógv mest, skuldi tað ganga eitt korter áðrenn teir fingu sín fyrsta málmøguleika. Magni á Lakjuni verður spældur púra leysur, men skotið frá honum endar á stongini.

Nógv spæl gekk fyri seg á miðjuni, og ein saknaði meiri beinleiðis spæl frameftir vøllinum. Nógv var spælt uppá tvørs og aftureftir, og tí kom eisini at ganga long tíð millum málmøguleikarnar.

Tá hálvur tími er spældur, sleppur Jákup á Borg leysur inni í brotsteiginum hjá Skála, men beint sum hann skal skjóta, verður hann takladur av einum verjuleikara.

Beint áðrenn hálvleik, fær Magni á Lakjuni ein møguleika aftrat at leggja B36 á odda. Hann sleppur at seta høvdið á eitt innlegg úr høgru síðu, men málmaðurin hjá Skála Eugen Voda bjargaði meistarliga.

So varð hálvleikur, og liðini høvdu nakað at tosa um. Fyrri hálvleikur hevði meira mint um ein venjingardyst í summarsteðginum, enn um ein landskappingardyst, har liðini kundu fáa 3 stig.



Tá bert 3 minuttir vóru eftir av dystinum javnaði Skála móti B36, hóast B36 hevði stýrt stóran part av dystinum.

## Liðini vaknaðu

Og at liðini høvdu tosa um tingini, sást beinanveg eftir steðgin. Meira ferð kom á. Bólturin bleiv fluttur skjótari, eins og nærdystirnir gjørdist harðari. Og tað var sum áskoðarnar eisini vaknaðu, og fóru at heppa sítt lið.

Tá 5 minuttir vóru leiktir, sleppur Kenneth Jacobsen ígjøgnum í høgru síðu og spælir Jákup á Borg frían, men hann skýtur við síðuna av. Her átti B36 at lagt seg á odda.

B36 tók nú yvir, og spældi nú sum ein hevði væntað av teimum frá byrjan. Skálamenn blivu trýstir longur og longur aftur á vøllin, og viðførdi hetta eisini, at B36 kom til fleiri møguleikar.

Tá lítið korter var leikt av seinna hálvleiki, fær B36 fríspark. Bólturin kemur væl innfyri, og John Petersen sleppur ótarnaður at seta høvdið á, men bólturin fer beint við síðuna av.

B36 kom tættari og tættari einum máli, og tá umleið 20 minuttir vóru leiktir eydnaðist tað so. Egil Zachariassen spælir av egnari hálvu Jákup á Borg leysan við einari góðari avlevering, men í staðin fyri at skjóta sjálvur, spælir Jákup tvørturum til John Petersen, sum stendur enn betri fyri. 1-0 til B36, og sum seinni hálvleikur hevði verið, var tað uppiborið at B36 kom framum.

Men Skála fekk møguleikan at javna stutt eftir. Jónhard Frederiksberg verður spældur fríur av Alexandur Johansen, men skýtur beint við síðuna av málinum.

Næstu løtuna stýrdi B36 dystinum. Teir vóru tryggir í verjupartinum, og fingu ofta spælt seg ígjøgnum í síðunum. Niels Joensen sum var innskiftur miðskeiðis í seinna hálvleiki, spældi væl og stóð aftanfyri nógv uppspæl.

Tá hálvur tími er farin kundi John Petersen avgjørt dystin. Áki Mørk sendir innfyri úr høgru síðu, men skotið frá John fer á yvirleggjarin og niður. Linjudómarin meinti ikki at bólturin hevði verið innanfyri.

Løtu seinni fekk Bárður Mortanson ein góðan møguleika at økja fyri B36, men heldur ikki hann fekk bóltin í mál.

## Skála javnar

Tað var B36 sum var betra liðið í seinna hálvleiki. Men sum so ofta hendir, tá eitt lið ikki brúkar sínar møguleikar, so kemur hitt liðið og skorar uppá eitt av sínum fáu alopum. Tá 3 minuttir eru eftir av dystinum, fær Skála innkast í vinstru síðu. Bólturin verður kastaður langt inn í brotsteigin. Verjan fær í fyrstu syftu bóltin burtur, men bert út til Paula Hansen, sum saksasparkaði bóltin í mál. Eitt vakurt mál.

Fyri B36 var hetta sum at fáa ein framaná. Teir høvdu stýrt stóran part av dystinum, og høvdu ikki duga at brúkt sínar møguleikar, sum stóðust av tí yvirvág teir høvdu, serliga í seinna hálvleiki.

John Petersen fekk ein góðan møguleika til síðst, men málmaðurin hjá Skála bjargaði.

Dysturin endaði sostatt 1-1, og skálamenn vóru fegnir um tað eina stigið. Og tað høvdu teir alla orsøk til at vera.

## Dysturin í tølum:

Skála-B36 1-1(0-0)
0-1: John Petersen
1-1: Pauli Hansen

EB/Streymur – VB 0-1 (0-0):

# VB reistist aftur

**Eftir tapið í seinastu viku lá trýstið á VB undan dystinum á Mølini móti EB/Streymi. Tað eydnaðist VB at vinna ein tepran 1-0 sigur, men dysturin var javnur og kundi farið báðar vegir**

FÓTBÓLTUR

*Stefan í Skorini*

Í einum tøttum dysti á Mølini á Eiði eydnaðist tað vágbingum at vinna ein tepran sigur á EB/Streymi. VB megnaði sostatt at reisa seg eftir dygga smeitin, liðið fekk, tá tað tapti fyri TB seinasta sunnudag. Hesi bæði liðini hittast aftur sunnudagin í fjórðingsfinaluni í steypakappingini.

Tað var annars EB/Streymur, sum legði harðari út í dystinum. Fyrsta hálva tíman hevði liðið greiða leikliga yvirvág og legði trýst á VB-málið. Tað eydnaðist tó ikki at fáa bóltin framvið Bjarna Johansen í málinum.

Størsta møguleikan hesa løtuna hevði Ronnie Samuelsen. Hann kom at standa ógvuliga væl fyri í brotsteiginum, men hann rakti als ikki bóltin nóg væl, og Bjarni hevði tí lætt við at bjarga.

Tá fyrra umfarið tók at halla, kom VB meira við í dystin og setti nøkur álop í gongd. Áleyparin Robert Cieslewicz fekk eisini eitt mál kolldømt fyri rangstøðu, tá hann beindi bóltin í netið staddur í málteiginum.

## VB fer framum

VB fekk einasta málið í dystinum, og var tað nýggi leikarin Nenad Zivanovic, ið avgjørdi dystin, tá umleið eitt korter var farið av seinna hálvleiki.

Ein langur bóltur varð sendur fram á vøllin, har innskifti Birgir Jørgensen snittaði víðari til Nenad, sum so gjørdist leysur við Gunnari á Steig. Hann lyfti bóltin uppum málverjan til 1-0. EB/Streymur iðrar seg um hetta málið, tí verjan skuldi havt tamarhalda á støðuni, men áleypararnir hjá VB vóru árvaknir og lúrdu eftir møguleikanum. Birgir Jørgensen var tikin við aftur til henda dystin, eftir at hann spældi við 2. deild seinasta vikuskiftið.

EB/Streymur royndi sum vera man at leggja trýst á VB eftir hetta, men tað eydnaðist ongantíð at fáa tak á aftur dystin. VB vardi sera væl, og teir vóru eisini vandamiklir í skjótálopum, tí heimaliðið sendi sum vera man fleiri fólk niðan á vøllin.

Nenad Zivanovic hevði enn ein málmøguleika eftir málið, men skot hansara fór júst framvið málinum. Vágbingar skaptu sum heild fleiri málmøguleikar hesa seinastu løtuna av dystinum.

EB/Streymur hevði tó eisini onkran málmøguleika. Marni Djurhuus hevði eina roynd, ið fór stutt framvið málinum.

Samanumtikið var tað ein javnur dystur á Mølini, men VB fór avstað við øllum stigunum.

## Dysturin í tølum:

EB/Streymur – VB 0-1 (0-0)
0-1: Nenad Zivanovic

EB/Streymur: Gunnar á Steig – Hallur Jacobsen, Knút Vesturtún, Alfred Jacobsen, Kristian Carlsson – Ronnie Samuelsen, Jákup Martin Joensen, Marni Djurhuus, Hans Pauli Samuelsen – Sorin Anghel, Andrzej Pacek

VB: Bjarni Johansen – Eyðun Jacobsen, Predrag Zivkovic, Magni Jacobsen – Slobodan Madzar, Palli Augustinussen, Gisli Sveinbjørnsson, Jón Gærdbo, Mortan úr Hørg – Robert Cieslewicz, Nenad Zivanovic



Í einum tøttum dysti á Mølini á Eiði eydnaðist tað vágbingum at vinna ein tepran sigur á EB/Streymi.